Álit

í

løgtingsmáli nr. 56/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Fiskidagaskipanin, leingja um gildistíðina á rættindum, føroyskir smábátar, tillagingar og fylgibroytingar)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, hevur lagt málið fram tann 4. november 2020, og eftir 1. viðgerð tann 13. november 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 24. november, 1., 8. og 14. desember 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Meginfelag Útróðrarmanna, Petur Sivertsen, útróðrarmann, Óla Jacobsen, Vága Útróðrarfelag, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Reiðarafelag, Havstovuna, Vørn og landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer, Bjarni Kárason Petersen og Henrik Old) hevur hesar viðmerkingar:
Við hesum lógaruppskoti verður Løgtingið fullkomiliga krøkt av, tá ræður um at skipa fiskivinnuna. Grundleggjandi heimildir verða fluttar frá lóggevandi valdinum yvir á útinnandi valdið, so landsstýrismaðurin fær nærum fríar hendur til at skipa allan fiskiskap – fiskidagar og fiskidagaleiðir, umbýti av døgum millum leiðir og veiðihættir, býtið av døgum á innaru og ytru leiðum, flokking av fiskiførum o.s.fr., o.s.fr.
Veiðan skal skipast eftir einari umsitingarætlan, men júst hvussu hetta fer at vera ásett, er ikki serliga greitt. Tað er nevniliga ikki lógarásett skylda, men ein avtala í samgonguni fyriliggur, sambært viðmerkingunum. Landsstýrismaðurin skal ikki leggja nakra umsitingarætlan fyri Løgtingið til viðgerðar, kunningar ella samtyktar.

Tað var eitt bragd, tá undanfarni landsstýrsmaður í fiskivinnumálum megnaði at fáa semju ímillum umboð fyri fiskivinnuna og fiskifrøðina um eina umsitingarætlan, við tí endamáli, at føroyskur fiskiskapur skal vera burðardyggur, bæði lívfrøðiliga og sosialt. Tað er tí eisini gleðiligt, at núverandi landsstýrismaður sigur seg fara at fylgja meginreglunum í gjørdu umsitingarætlanini. Her eru tó fleiri avbjóðingar. Tí fyri fleiri bólkar er fiskidagatalið ikki hitt sama, sum tað var, tá avtalan um umsitingarætlan varð gjørd. Dagar eru varandi fluttir millum bólkar, og er útgangsstøðið fyri lækking og hækking í døgum tí skeiklað. Lógin áleggur ikki landsstýrismanninum at fylgja lívfrøðiligu tilráðingini ella leistinum fyri umsitingarætlan, og hann kann í prinsippinum tí gera, sum honum lystir.

Løgtingslógin um fyrisiting av sjófeingi, sum undanfarna samgonga í 2017 samtykti, ásetti greitt, at landsstýrismaðurin skuldi leggja fyri Løgtingið umsitingarætlan og veiðireglur í uppskoti til samtyktar, sum setir karmar og mannagongdir í sambandi við at áseta mest loyvdu veiðu og í sambandi við at áseta fiskidagatal.

Á henda hátt kundi fólkavalda parlamentið tryggja, at allir partar verða hoyrdir, og at breið undirtøka er fyri umsitingarætlanini. Júst í samsvari við gjørdu avtaluna um umsitingarætlan, har

tað stendur at *"karmurin um at áseta fiskidagar verður ein politiskt góðkend umsitingarætlan, sum ásetir reglur og mannagongd fyri, hvussu árliga fiskidagatalið verður sett".* Í staðin fyri at tryggja sær hesa breiðu politisku undirtøku frá Løgtinginum, tekur landsstýrismaðurin allar heimildir til sín og byggir fiskivinnulóggávuna á politiskar semjur í eini smalari samgongu.

Løgtingið fer frameftir at hava millum lítla og onga ávirkan á, hvussu milliarda virði av fiskatilfeingi verður umsitið. Meirilutin ivast í, um samgongan hevur verið heilt greið yvir, hvussu stórt vald við hesum verður flutt landsstýrismanninum og umsiting hansara, og hvussu ógjøgnumskygt fiskivinnulóggávuøkið, sum frammanundan longu er rættuliga samansett og torgreitt, verður frameftir.

Ásetingarnar um innaru og ytru fiskidagaleiðir, sum higartil hava verið lógarásettar, vil landsstýrismaðurin eisini hava heimild at seta í kunngerð. Tað heldur meirilutin ikki vera skilagott, og tekur tí undir við at strika hesa áseting, sum skotið er upp í álitinum.

Umboð fyri útróðrarflotan hava víst á, at húkaflotin er sera kroystur frá øllum síðum. Hetta er ein bólkur, ið ikki hevur fingið tillutað makrel ella annan stuðul, og sostatt ikki fingið lut í stóra vøkstrinum av fiskatilfeingi. Snelluflotin verður hart kroystur av línuni, og landsstýrismaðurin hevur í nevndini játtað, at hann vil umhugsa, at leiðir, sum hava verið grundarlagið undir snellufiskiskapi, kunnu avmarkast ella friðast fyri línu. Einki ítøkiligt liggur tó á borðinum.

Meirilutin heitir staðiliga á landsstýrismannin um at taka ávaringarnar og neyðarrópini frá útróðrarflotanum í álvara, og gera reglur, sum trygga grundarlagið hjá teimum, sum hava útróðurin sum livibreyð.

Við uppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild at seta treytir fyri fiskifar undir 15 tons, fyri at hesi fáa fiskiloyvi. Meirilutin vil her vísa á, at tað er umráðandi, at Fiskimálaráðið tryggjar, at krøvini, ið verða sett til útróðrarbátar, sum treyt fyri at fáa siglingarloyvi, eru rímilig.

Landsstýrismaðurin ætlar at skipa ein serligan bólk fyri opnar, føroyskt bygdar bátar. Tað eigur at vera Løgtingið, sum ásetir bólkarnar, og kann ikki vera rætt, at landsstýrismaðurin kann skipa nýggjan bólk í kunngerð.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Johan Dahl, Beinir Johannesen og Jákup Mikkelsen) hevur hesar viðmerkingar: Fyriliggjandi løgtingsmál eru broytingar í Sjófeingislógini, ið bleiv samtykt fyri einum ári síðan.

Broytingar eru innan fiskidagaskipanina, gildistíð á rættindum, ásetingar fyri opnar føroyskar bátar o.a. Størsta broytingin er tann, at frameftir ásetir landsstýrismaðurin fiskidagarnar í kunngerð, ið verður gjørt eftir einari umsitingarætlan.

Í mai 2019 kom ein arbeiðsbólkur, mannaður við umboðum frá fyrisiting, Havstovuni og vinnuni, við einum tilmæli um eina umsitingarætlan, ið hevði til endamáls at finna út av, hvussu vit á bestan hátt fyrisita fiskiskapin eftir botnfiski í føroyskum sjógvi.

Minnilutin heitir á landsstýrismannin um, at umsitingarætlanin verður partur av árligu frágreiðingini hjá landsstýrismanninum, ið hann skal leggja fyri tingið sambært § 7, stk. 4 í lógini.

Minnilutin mælir landsstýrismanninum til, at mannagongdir viðvíkjandi áseting av fiskidøgum, sum tilmæli av umsitingarætlan leggur upp til, verða fylgdar.

Í sambandi við viðgerðina av hesum máli hava hoyringarpartar mett, at fiskidagaskipanin er skeiklað orsakað av broytingum viðvíkjandi fiskidøgum síðan mai 2019, og tí kunnu hesar broytingar ikki fremjast við støði í umsitingarætlanini. Fiskimálaráðið hevur undir viðgerðini sent nevndini svar upp á fyrispurning um hetta, har Havstovan hevur boðað frá, at hesar broytingar eru tiknar til eftirtektar, og eru tiknar við í ráðgevingini fyri áseting av fiskidøgum í 2021.

Sum sagt, so ásetir landsstýrismaðurin fiskidagarnar í kunngerð. Umframt fiskidagar leggur umsitingarætlanin upp til, at markið millum innaru og ytru fiskidagaleið verður strikað í lógini, og lagt til landsstýrismannin at umsita í kunngerð. Tað er orsøk til broyting nr. 7, ið strikar § 20 í lógini. Minnilutin metir ikki, at grundgevingarnar fyri hesari striking eru haldgóðar. Tí mælir minnilutin til, at vit halda fast í § 20 í lógini.

Lógin ásetir, eins og við undanfarnu lóg, at Løgtingið hvørt ár skal taka støðu til, um gildistíðin á rættindunum skal leingjast við einum ári. Loyvini eru sambært lógini galdandi í 12 ár. Minnilutin tekur undir við, at gildistíðin á rættindunum verður longd við einum ári.

Minnilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 6 verður í § 19, stk. 1. "nærri reglur um fiskidagaleiðir," strikað.

2. § 1, nr. 7 verður strikað.
   § 1, nr. 8-15 verða eftir hetta § 1, nr. 7-14.

3. Í § 2, stk. 2 verður "§ 1, nr. 2-10, 14 og 15" broytt til: "§ 1, nr. 2-9, 13 og 14".

Serligar viðmerkingar

Til nr. 1:
Konsekvensbroyting av broyting nr. 2.

Til nr. 2:
Sambært broytingini í upprunauppskotinum verður greinin, sum ásetir markið millum innaru og ytru fiskidagaleið, strikað.

Ásetingin um innaru og ytru fiskidagaleið skal framvegis standa í lógini. Sostatt verður allýsingin um innara og ytru fiskidagaleið verðandi í lógini, og um broytingar skulu gerast, mugu hesar leggjast fyri Løgtingið.

Til nr. 3:
Teknisk broyting av broyting nr. 2.

Við hesum broytingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 14. desember 2020

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	